## Havísurin nærkast

Fru einari góðari viku síðani hildu menn, at havísurin í Grønlandsfjørðinum var farin at minka, og at hann tók seg longri og longri burtur frá íslendsku strondini. Nú vísa nýggjar loftmyndir, at ísurin er væl nærri landi nú enn tá. Um vikuskiftið var ísrondin bara 16 fjórðingar frá Vestfirðum. Roknað verður við, at ísurin kann fara at órógva skip, sum sigla um Horn, sum er útnyrðingshornið á Íslandi, og myndugleikarnir hava ávarað skip um ísin.



*Ísurin er bara 16 fjórðingar úr landi í Íslandi (Mynd: Morgunblaðið)*

## Teir størstu veksa

Val altingsval í Íslandi í dag, høvdu teir báðir størstu flokkarnir, Sjálfstæðisflokkurin og Samfylkingin, fingið 50 av teimum 60 limunum í Altinginum. Sjálfstæðisflokkurin hevði fingið 40,1 prosent av atkvøðunum og 27 tingmenn, og Samfylkingin hevði fingið 35,2 prosent og 23 tingmenn. Verri er hjá Framsóknarflokkinum og Frjálslynda Flokkinum, sum høvdu mist helmingin av sínum atkvøðum. 71 prosent av íslendingum eru nøgdir við verandi stjórn.

# Thor Alpha komin og doyptur

**Leygarmorgunin kom nýbygningurin hjá Thor í Hósvík á Skála, har hann fyrrapartin hendan dagin varð navngivin og alment latin eigarunum**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Thor Alpha á veg úteftir Skálafjørðinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hóast vánaligu veðurlíkindini leygarmorgunin var nógv fólk samankomið á bryggjuni á Skála til hátíðarhald, tá ið fyrra skipið, sum Thor hevur latið smíðað á Skála Skipasmiðju, varð navngivið og alment latið eigarunum.

Navnið er Thor Alpha.

Skipið hevur seinastu tíðina verið í Assens í Danmark til sandblásingar, metalisering og málingar.

Undir hátíðarhaldinum var nógvur vindur, og regnið oysti niður. Hóast ringu líkindini setti Nes Sóknar Hornorkestur, sum so manganáður, sín serstaka dám á hátíðarhaldið við sínum hátíðarligu tónum.

Tað var Gudrun Joensen, mamma til brøðurnar og eigararnar Gunnbjørn og Hans Andrias Joensen, ið gav skipinum navn. Tað var við hesum orðum, at hon doypti skipið:

*"Undir kjøli bylgjan klár og blá*
*Um onkuntíð hon vera há og grá*
*Má Harrin blíðan byr tær geva*
*Thor Alpha skal navn títt vera"*

Tá ið skipið varð navngivið, bar 5 ára gamla dóttir Hans Andrias gummuni – og ommuni - eina vakra blómusamling.

### Røður hildnar

Vegna byggiharran helt stjórin á Skála Skipasmiðju, Eyðfinn Egholm, eina røðu, og tað gjørdi Hans Andrias Joensen eisini vegna eigararnar.

Eftir navngeving og formellu handanina á bryggjuni, bjóðaði Skála Skipasmiðja ábit í matarhøllini, har øll vóru vælkomin. Fólk høvdu eisini høvi at fara umborð og síggja nýggja og stásiliga skipið.

Eini 400 fólk vóru í matarhøllini á Skála Skipasmiðju, sum soleiðis var stúgvandi full. Talan var bæði arbeiðsfólk og mong onnur, sum ynsktu at vera við til hátíðarhaldið.

Við løtuna í matarhøllini sang kórið hjá Tórshavnar Skipasmiðju einar tríggjar føroyskar sangir, og hetta setti eisini sín dám á. Sum skilst, plaga nakrir mans at taka seg saman at syngja, tá ið skipasmiðjan skipar fyri onkrum serligum tiltaki.

Eftir móttøkuna á Skála sigldi Thor Alpha við innbodnum gestum til Hósvíkar, har Sunda kommuna eisini skipaði fyri móttøku.

# Positiva ávirkan á samfelagsbúskapin

**Nýggi skipasmiðjustjórin er sera fegin um ta vælvild, sum Landsfelag Handverkaranna hevur víst í sambandi við skipasmíð á Skála**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eyðfinn Egholm, sum er nýggjur stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju og Skála Skipasmiðju, bar eisini fram eina heilsu á Skála leygarmorgunin, tá ið Thor Alpha varð navngivin.

Hann ynskti øllum, sum komin vóru saman á bryggjuni, hjartaliga vælkomnum.

Eyðfinn takkaði teimum, sum standa aftanfyri reiðaríið Thor, fyri tað álit, sum felagið hevur víst skipasmiðjuni og fyri tað góða samstarv, sum hevur verið partanna millum í byggitíðini.

- Eisini vil eg takka øllum okkara starvsfólkum, sum hava tikið hesi stóru og neyðugu tøk, fyri góðan vilja at fáa hesa verkætlan undir land.

Eins og Hans Andrias Joensen, reiðari, nevndi Eyðfinn Egholm eisini undirveitararnar, Articon, El-Service, Radiobúðina og Demich, sum hann takkaði fyri gott samstarv og vilja til at finna loysnir ávegis í hesi verkætlan.

Á enskum bar skipasmiðjustjórin fram hesa tøkk til pólsku skipasmiðjuna, sum hevur latið handverkararnar, ið hava gjørt stálarbeiðið:

- Also I want to thank Pomerania and all the workers from Poland who have done such an excellent job.

Hann vísti á, at nógv, sum eisini hava tikið tøk, ikki eru nevnd, men eisini teimum ynskti hann at bera eina hjartans tøkk.

- At enda – men ikki minst - vil eg takka Landsfelag Handverkaranna fyri teirra vælvild og góða innlit í ta positivu ávirkan, sum tílíkar verkætlanir hava á samfelagsbúskapin, og eg vóni at tað góða samstarvi heldur framm, segði Eyðfinn Egholm, skipasmiðjustjóri.



*Nýggja skipið hjá Thor er 55 metrar langt og 13 metrar breitt*